# Fóru útav við stolnum vørubili

**Leygarnáttina varð ein vørubilur stolin á Skálatrøð. Tjóvarnir fóru tó útav við bilinum uppi í Hoydølum**

STULDUR
*Stefan í Skorini*

Leygarnáttina høvdu tveir ungur menn, ið eru 18 og 21 ára gamlir, tørv á flutningi úr miðbýnum og niðan í Hoyvík.

Har vóru góð ráð dýr, og teir gjørdu av at stjala ein lastbil hjá heilsøluni Poul Michelsen. Tað var ein stórur bilur við innilokaðari last. Hesin skuldi føra teir tann langa vegin til Hoyvíkar. Lykilin stóð eftir øllum at døma í bilinum, og tí var lag á manni at taka hann.

Tað eyndaðist teimum at sleppa avstað við bilinum, og teir komu heilt niðan á Garðaveg beint omanfyri studentaskúlan í Hoydølum.

Her vóru teir tó ikki nóg neyvir við stýringini, og bilurin fór omanav vegnum. Tilburðurin varð fráboðaður stutt eftir klokkan eitt á nátt.



*Hesin lastbilurin hjá Poul Michelsen varð leygarnáttina stolin, og hann fór seinni útav vegnum uppi í Hoyvík*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Sløkkiliði breyt arbeiðssteðg

Løgreglan handtók báðar menninar, ið eru av bygd. Teir verða skuldsettir fyri at hava koyrt við kenning og fyri stuldur av lastbilinum. Blóðroyndir vórðu tiknar og sendar til nærri kanningar. Harafturat kunnu teir vænta sær eitt endurgjaldskrav fyri skaðan, ið bilurin hevur fingið.

Báðir menninir vórðu fluttir á landssjúkrahúsið. Annar varð útskrivaður eftir at hava fingið viðgerð á skaðastovuni, meðan hin varð innlagdur á deild 8 til kanningar.

Tá løgreglan kom á staðið ljóðaði, at ein triði maður lá undir bilinum. Tí var neyðugt at boðsenda sløkkiliðnum, sum kom á staðið, tí tað kanska stóð um mannalív. Annars er sløkkiliðið ikki til arbeiðis í hesum døgum vegna sáttmálaloysi, men teir brutu arbeiðssteðgin í hesum førinum.

Sløkkiliðið kundi staðfesta, at eingin lá undir bilinum. Seinni hevur kranabilur verið og tikið bilin uppaftur.

Rokningina fyri hetta arbeiðið verður óivað send teimum báðum ungu monnunum. Tá hevði verið bíligari at tikið ein hýruvogn.

## Sligin í høvdið við fløsku

**Leygarnáttina komu tveir menn til ilnar í Havn. Annar varð sligin í høvdið við eini fløsku og varð fluttur á skaðastovuna, har hann varð seymaður**

HARÐSKAPUR
*Stefan í Skorini*

Tilburðurin fór fram í Amtmansbrekkuni í miðbýnum í Havn. Tveir menn gjørdust ósamdir um eitthvørt, og tað endaði við, at teir blivu áfastir.

Illgerðarmaðurin, ið er 21 ára gamal, sló hin í høvdið við eini fløsku. Neyðugt varð at flyta mannin, ið er 29 ára gamal, á sjúkrahúsið, har hann varð seymaður aftur og fekk nakrar pentur.

Løgreglan fekk fráboðanina um henda tilburðin klokkan 4.36, og maðurin varð tikin stutt eftir nærhendis. Hann verður tí skuldsettur fyri harðskap.

Løgreglan sigur, at gerningsmaðurin var avbygdamaður, sum var komin til Havnar um vikuskiftið. Maðurin, ið varð órættaður, er hinvegin úr Havnini.

## Koyrdi við kenning í Fuglafirði

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Leygardagin seint seinnapartin varð ein 21 ára gamal tikin fyri at koyra við kenning. Maðurin var einsamallur í bilinum, sum rendi í bilverjuna framvið vegnum millum Fuglafjørð og Kambsdal.

Løgreglan fór á staðið, og tá maðurin blásti í ballónina, vísti tað seg, at hann varð ávirkaður meira enn væl er, tá ein skal stýra einum bili.

Blóðroynd varð tikin, og hon fer at vísa, hvussu høg promillan var. Bilurin fekk nakað av skaða, men hann er ikki vrak.

## Knústir rútar í miðbýnum

HERVERK
*Stefan í Skorini*

Herverksmenn hava aftur verið uppá spæl í Havn um vikuskiftið. Kioskin í Steinatúni og Thomas Dam búnýti hava staðið fyri skotum hesuferð.

Í báðum førum eru tað rútar í úthurðini, ið eru knústir. Einki endamál hevur verið við hesum herverkum, tí einki bendir á, at nakar hevur verið inni í handlunum.

# Náttarravnar lata bíða eftir sær

**Tiltakið við Náttarravnum er ikki farið av bakkastokki enn. Tað skal skipast betur, og fleiri fólk skulu savnast um tiltakið, áðrenn farið verður út á gøtur og stræti at ansa eftir teimum blaðungu**

NÁTTARRAVNAR
*Stefan í Skorini*

Tað ganga einar tvær ella tríggjar vikur, áðrenn foreldur at ungum í Havn fara út at hava eyguni við teimum ungu, sum ferðast í havnargøtum seint á kvøldi um vikuskiftini.

Arni Clementsen er ein av stigtakarunum til hetta tiltakið. Hann sigur, at stigtakararnir vilja savna fleiri foreldur um tiltakið, áðrenn farið verður í gongd. Eisini skal tað skipast væl og virðiliga, áðrenn nakað verður sett í verk.

Næsta stigið hjá teimum verður at kalla til borgarafund í Havn. Hesin fundur verður væntandi um tvær ella tríggjar vikur. Arni Clementsen, sum sjálvur eigur ung børn, vónar, at foreldur møta fjølment upp til hesar fundirnar. Higartil hevur undirtøkan verið góð, og tey flestu eru spent um, hvussu hetta fer at rigga.

### Ikki í hølunum

Ætlanin er ikki, at náttarravnarnir skulu ganga í hølunum á teimum ungu allatíðina, so at tey kenna seg forfylgd á nakran hátt.

– Konseptið við hesum tiltakinum er at hava eitt vakið eyga við teimum ungu, men tað skal hóast alt vera nakað burturfrá, og kanska geva eina hjálpandi hond, um onkur er í trupulleikum, sigur Arni Clementsen, sum leggur afturat, at tey ikki vilja treingja seg inná tey ungu.

Hann heldur ikki, at hetta er at gera ov nógv av, tí at fleiri tilburðir við harðskapi hava verið seinastu tíðina.

– Hetta er fyribyrgjandi arbeiði. Tað hevur verið tosað um hetta í fleiri ár, og tað ger heldur einki, um foreldur skipa seg í bólkar uttan at hugsa um ávísar hendingar, sigur Arni Clementsen.

### Kann ávirka

Ætlanin við náttarravnunum er eisini, at hesin felagsskapur kann geva til kennar, hvussu dansiviðurskiftini hjá teimum ungu kunnu skipast.

– Vit kunnu venda okkum til myndugleikar og fyriskiparar av konsertum og dansi og vísa á okkara hugsan hesum viðvíkjandi. Soleiðis kunnu vit hava ávirkan á viðurskifti hjá teimum ungu, sigur Arni.

Arni Clementsen sigur annars, at hann vónar, at nógv taka undir við hesum tiltakinum. Jú fleiri eru við, tess minni bundið verður tað hjá tí einstaka náttarravninum.



# Styðja føroyskum sjálvstýrisynskjum



*Landstingsalurin á Christiansborg var karmur um fundin hjá politisku ungmannafeløgunum um vikuskiftið. Ole Morten Geving úr norska Miðflokkinum v.m. saman við einastu føroysku umboðunum, Jógvan Jacobsen og Rúna Nielsen frá Unga Tjóðveldið.*

**Politisku ungmannafeløgini í Norðurlondum taka undir við einum føroyskum kravi um fult sjálvstýri, um meiriluti er fyri tí á einari fólkaatkvøðu.**

MAGNUS DAM
*Keypmannahavn*

– Seta føroyingar fram krav um fult sjálvstýri, og meiriluti er fyri hesum á einari fólkaatkvøðu, so skal hetta kravið virðast.

Tað siga politisku ungmannafeløgini í einari yvirlýsing, sum varð samtykt á árliga fundinum hjá feløgunum, sum var í Keypmannahavn um vikuskiftið. Feløgini hittast á hvørjum ári í samband við fundin hjá Norðurlandaráðnum, sum byrjaði í Keypmannahavn í gjár.

Umleið 50 ungdómspolitikkarar úr øllum Norðurlondum hava fundast í tríggjar dagar í landstingsalinum á Christiansborg, og fundurin endaði við, at fleiri yvirlýsingar vórðu samtyktar. Yvirlýsingarnar vórðu í gjár lagdar fram fyri teir »veruligu« politikkararnar, sum komu á fundin hjá Norðurlandaráðnum, teirra millum forsætisráðharrarnar úr øllum Norðurlondum.

### Virða sjálvsavgerðarrættin

Ungmannafeløgini siga í einari av yvirlýsingunum, at tey virða sjálvsavgerðarrættin hjá føroyska fólkinum sum eitt demokratiskt prinsipp. – Vit styðja einum møguligum føroyskum kravi um fult sjálvstýri, um so er, at hetta verður staðfest á einari fólkaatkvøðu, siga feløgini.

Ungmannafeløgini halda tað eisini vera eitt stig rætta vegin, at føroyingar sjálvir hava tikið stig til at minka um blokkstuðulin.

– Við sjálvstýri fylgja rættindi og skyldur, sum sjálvstøðugar tjóðir hava. Tað inniber eisini, at beinleiðis búskaparligi stuðulin úr Danmark dettur burtur, stendur í yvirlýsingini.

Tað var eftir uppskotið frá Unga Tjóðveldinum, at brotið um føroyskt sjálvtýri kom við í yvirlýsingina.

– Men hetta er ein boðskapur, sum vit taka fult undir við, segði formaðurin í felagsskapinum hjá norðurlendsku ungmannafeløgunum, Ole Morten Geving úr norska Miðflokkinum.

Unga Tjóðveldið var einasta føroyska ungmannafelag, sum luttók á fundinum í Keypmannahavn. Rúni Nielsen, næstformaður í felagnum, harmast um, at fleiri føroysk feløg ikki luttóku. Hann fegnast hinvegin um brotið um føroyskt sjálvstýri í yvirlýsingini hjá ungmannnafeløgunum.

# Uttanríkispolitikkur stóran leiklut

**Í kjalarvørrinum av yvirgangsherferðunum, verður nógv gjørt burturúr uttanríkis- og trygdarpolitikki á Norðurlandaráðsfundinum í ár**

NORÐURLOND
*Turið Kjølbro*

Í gjár varð Norðurlandaráðið sett á Christiansborg í Keypmannahavn. Ikki færri enn 850 fólk taka lut á fundinum, sum varir til í morgin, harav 55 ráðharrar. Fyri nøkrum døgum síðani løgdu Svend Erik Hovmand, sum er formaður í Norðurlandaráðnum, og Jan-Erik Enestam, samstarvsráðharri í Finnlandi og formaður í Norðurlendska Ráðharraráðnum í ár, álitið fram, sum hevur heitið »Ein nýggj norðurlendsk dagsskrá«. Tíðin er komin at seta eina nýggja dagsskrá við serligum atliti til norðurlendskt samstarv, bæði í mun til nýggja samstarvandi Evropa og í mun til aðrar millumtjóða samstarvsstovnar. Í álitinum eru fleiri uppskot um strategisk stevnumið og ein meiri munadyggan bygnað fyri samstarvi komandi árini. Nýggja álitið verður nógv frammi á fundinum. Umframt verður serliga nógv gjørt burturúr uttanríkispolitikki fyrrapartin í morgin.

Í sambandi við ársfundin, verða nógvir fundir hildnir millum ráðharrar. Innan karmarnar hjá Norðurlendska Ráðharraráðnum hittast fíggjarmálaráðharrar, umhvørvismálaráðharrar, samstarvsmálaráðharrar, kenslu- og granskingarmálaráðharrar, umframt mentamálaráðharrar. Eisini verður eini meiri óformligur fundur hildin millum matvørumálaráðharrar, fiskimálaráðharrar umframt landbúnaðarmálaráðharrar. Eisini hittast innanríkis- og uttanríkismálaráðharrar, tó ikki innan karmarnar hjá Norðurlendska Ráðharraráðnum. Vanliga taka fleiri føroyskir landsstýrismenn lut á Norðurlanda ráðsfundinum.

## Brotamyndir úr gerandisdegnum

**Meðan løtur líða 2 er komin í bókabúðirnar**

ÚTGÁVA
*Turið Kjølbro*

Forlagið Fannir hevur givið út Meðan løtur líða 2, sum Marianna Debes Dahl hevur lagt til rættis. Bókin, sum er brotamyndir úr gerandisdegnum tíðliga í tjúgundu øld, er útskrift av teimum níggju mittastu av 28 útvarpssendingum við sama heiti. Evnini í hesu bókini eru Sanatoriið, Spøl úti summarhálvuna, Kúgvin og neytakonur, Hoygging og korn, Torv, Torv og tarvar, Kirkjan, fólkafundir og felagslív, Gomul fólk, Dansur og brúdleyp.

Marianna Debes Dahl festi samrøðurnar við heimildarfólkini á band frá 1994 til síðst í 1998. Heimildarfólkini eru seytjan í tali, 12 kvinnur og 5 menn. Tað elsta er føtt í 1906.

Ingi Joensen gjørdi kápuna. Bókin er prentað á Hestprentið, hon er 134 síður og kostar 220 krónur.